BÝRÁÐSSKRIVSTOVAN TVØROYRAR BÝRÁÐ
www.tvoroyri.fo · tvoroyri@tvoroyri.fo · tlf 611085 · fax 371814 · postboks 80 · FO 800 Tvøroyri

# Roknskapur 2018

Tvøroyrar býráð samtykti á býráðsfundi 12. juni 2019 roknskapin fyri 2018.
Í fíggjarætlanini fyri 2018 varð roknað við einum halli á 22.978 mió.
Ársroknskapurin vísir tó eitt avlop á 8.952 mió., t.e. 31.930 mió meira enn væntað.

Samlaði raksturin av kommununi kostaði 66,77 mió. í 2018 og er hetta 2,6 mió minni enn roknað varð við í fíggjarætlanini fyri 2018. Meirnýtsla er staðfest í § 2 Almanna- og heilsumál á tkr. 853 og § 4 Undurvísing tkr. 288

Í fíggjarætlanini var roknað við at gera íløgur fyri 27,859 mió í 2018, men roknskapurin vísir, at tað vóru gjørdar íløgur fyri 11,107 mió, sum kunnu sundurgreinast soleiðis:

| | | t.kr. |
|---|---|---|
| § 1 | Kommunal fyrisiting | 122 |
| § 3 | Børn og ung | 4.562 |
| § 4 | Undirvísing | 744 |
| § 5 | Mentan og frítíð | 7 |
| § 6 | Teknisk mál | 5.194 |
| § 7 | Kommunal virki | 478 |
| | | 11.107 |

Inntøkurnar hjá Tvøroyrar kommunu í 2018 vóru 12,541 mió hægri enn væntað. Roknað var við 74,290 mió í inntøkum, men roknskapurin vísir, at samlaðu inntøkurnar vóru 86,831 mió. Inntøkan av persónsskatti var 63,569 mió og av partafelagsskatti 4,522 mió og er hetta 11,523 mió meira enn roknað varð við í fíggjarætlanini fyri 2018.

Kommunan hevur í 2018 goldið 3,508 mió í avdráttum og var nettoskuldin við árslok komin niður á 0,30 álíkning. Viðmerkjast kann, at tá skuldin var hægst, var hon góðar 8 álíkningar.

Framgongdin í kommununi seinast árini hevur ført við sær, at býráðið fyri 2019 hevur lækkað skattaprosentið við 1,0%. Harumframt eru gjøldini á barnaansingar-økinum og frítíðarskúlanum soleiðis, at hjá foreldrum sum hava meira enn 2 børn í ansingarskipanini verða 3. og eftirfylgjandi systkin ansaði ókeypis.

Tvøroyri, hin 14.06.2019

Kristin Michelsen
Borgarstjóri

Jónleyg J. Bech
Kommunustjóri